## B36 og KÍ skiftu málverja

B36 hevur á heimasíðu sínari boðað frá, at tað verður Meinhardt Joensen, sum skal loysa Jákup Mikkelsen av sum málverji. Jákup Mikkelsen, sum er fluttur aftur til Klaksvíkar, gjørdi í heyst av, at hann fer aftur til KÍ,og tað bar við sær, at Meinhardt Joensen misti sjálvskrivaða plássið, sum hann annars hevur havt seinastu tvey árini. Meinhardt, sum er 28 ára gamal, hevur í fleiri ár verið roknaður millum fremstu føroysku málverjarnar, og onkran landsdystin hevur hann eisini siti á beinkinum sum eykamálverji fyri Jákup Mikkelsen. Umframt KÍ hevur hann eisini spælt í B68 og GÍ.



## Kaka aftur favorittur

Brasilski Kaka er stórfavorittur, tá FIFA mánakvøldið fer at avdúka, hvør fær heiðurin sum besti spælarin í heiminum í 2008. Eins og í dystinum um gylta bóltin frá France Football, so eru Cristiano Ronaldo og Lionel Messi við í kapprenningini, har tað eru liðformenn og venjarar hjá landsliðum, í hava greitt atkvøðu. Seks av seinastu tíggju ferðunum hevur móttakarin av gylta bóltinum frá France Football og heiðrinum frá FIFA verið tann sami. Og miðlar kring allan heim eru á einum máli um, at soleiðis verður eisini hesaferð. Kaka hevur í ár eisini vunnið heitini sum World Player of the Year, sum enska World Soccer stendur fyri. UEFA's Club Footballer of the year, besti áleypari í Champions League, toppskjútti í Champions League og ársins spælari hjá FIFPro, ið er altjóða spælarasambandið.

StÍF-Kyndil 30-26 (15-12):

# Stórspælandi strandingar

**Eingin tykist steðga StÍF í løtuni. Leygardagin skræddu teir seg leysar í oddinum, tá Kyndil heldur ikki stóð teimum kurl**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

StÍF stevnir við fullari ferð móti finaluplássinum í Atlantic Airways-kappingini. Leygardagin vitjaði Kyndil, sum við sigrinum á H71 seinasta vikuskifti fekk nakað av luft, men hetta var tó langt ífrá nóg mikið til at steðga strandingunum.

Styrkirnar hjá StÍF eru so nógvar. Og júst tí er tað so serstakliga trupult at basa teimum, tá spælið koyrir. Málverjin er framúr, og tað í sjálvum sær er nóg mikið til at taka pippið frá teimum flestu. Bakketan hevur evni til bæði at spæla skjótt og skjóta hart, og so ber væl til at spæla tunt, soleiðis at málfarligu vongaspælararnir eisini sleppa framat.

Og alt hetta fekk Kyndil eisini at sanna leygardagin. Gestirnir vóru annars teir, sum byrjaði betri, men tá vertirnir fingu glið á, beyð ikki bøtur. Seinastu 20 minuttirnar av fyrra hálvleiki vann StÍF 12-6, og eftir steðgin hildu teir bara fast um leiðsluna, sum spakuliga varð útbygd. Og hóast Finnur Hansson, sum í fjør gjørdi nógv um seg fyri StÍF, royndi at halda lív í vónunum, so hjálpti hetta lítið.



*Hóast tað er góður styrkur hjá Kyndli, at Josef Abrahamsen nú aftur er á liðnum, so var tað ikki nóg mikið móti StÍF, sum í løtuni er nógv besta boðið upp á ein komandi føroyameistara*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Breið styrki

Við sigrinum er StÍF komið upp á 17 stig, og enn halda teir seg fimm stig undan nummar trý og harvið hóttanini um at missa finaluplássið.

Spælið, sum StÍF fyri tað mesta hevur sýnt í ár, saman við tí fakta, at tað nú bert eru níggju dystir eftir at spæla, ber við sær, at tað í løtuni tykist ógvuliga lítið sannlík, at nakar skal hótta hendan sessin.

Áður hevur trupulleikin ofta verið, at liðið ikki megnar at halda dampinum uppi gjøgnum heilt kappingarár, og tí hóvar tað ivaleyst væl strandingum, at kappingin nú fer í langan vetrarsteðg. Tað ber við sær, at menn uttan iva eru frískir, tá farið verður undir seinasta partin av kappingarárinum, og tí er einki at siga til, at strandingar nú spakuliga eru farnir at droyma um eina greipu. Tað hevur liðið enn ikki roynt, hóast teir hava verið í steypafinaluni bæði í 1999 og í 2003, tá FM-heitið varð vunnið.

Hjá Kyndli eru møguleikarnir fyri at røkka finaluni av álvara farnir at minka. Enn er vónin ikki heilt slept, men skal hetta røkkast er kravið ein endaspurt, har helst einki stig skal missast, tað sum eftir er av kappingarárinum.

### FAKTA

**StÍF-Kyndil 30-26 (15-12)**
10 min: 3-6
20 min: 10-8
40 min: 20-16
50 min: 26-20
**Málskjúttar**
**StÍF:** Bárður Danielsen 6, David Edvardsen 6(1), Leivur Justinussen 5(4), Sveinur Justinussen 5, Bent Djurhuus 3, André F. Danielsen 3, Jón Rasmussen 1, Danni Syhler 1
Kyndil: Finnur Hansson 10, Josef Abrahamsen 4(2), Hjalti M. Jacobsen 3, Bárður Johannesen 2, Janus Einar Sørensen 2, Hans Áki Dal Christiansen 2, Rani Ellingsgaard 2, Ken Zachariassen 1
**Brotskøst:** StÍF 6, Kyndil 4
**Útvísingar:** StÍF 5, Kyndil 3
**Diskvalifikatión:** StÍF 1 (3X2 minuttir)
**Dómarar:** Kristian Joensen & Kári Hansen

StÍF-Kyndil 23-18 (11-6):

# Næsti sigurin á rað

**Við fýra stigum í tveimum dystum hava kvinnurnar hjá StÍF vunnið seg burtur frá aktuttum niðurflytingarvanda**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Knívurin var ikki heilt so nógv á barkanum hjá StÍF hesaferð, sum hann var tað fyri viku síðani, tá liðið spældi botnuppgerð móti VÍF.

Heldur var tað gularótin, sum lokkaði, nú liðið kundi taka enn eitt fet burtur frá botninum, og móti einum Kyndils-liði, sum hevur havt stór sveiggj í avrikunum í vetur, eydnaðist enn eina ferð hjá StÍF at fáa fulla úrtøku.

Og eins og í dystinum móti VÍF, so var sjáldan ivi um, at StÍF bæði vildi og skuldi hava stigini. Frá fyrsta bríksli vóru tær grammara liðið, og tað gekk heldur ikki long tíð, áðrenn tær byrjaðu at vinna sær eina fitta leiðslu.

Seinna korterið av fyrra umfarinum var snøgt sagt klassamunur á, og veruligt sorl lá leingi í luftini. Eitt skifti í seinna hálvleiki vóru heili 11 mál á muni, og tó at Kyndil slapp upp í part seinasta korterið ella so, so megnaðu tær ongan tíð at skapa minsta vetið av spenningi í dystin.



*StÍF læt ongan iva vera vera um, at tær skuldu hava stigini, tá Kyndil vitjaði leygardagin*
*savnsmynd*

### Óvæntaður fyrimunur

Við sigrinum vann StÍF seg upp á liðina á Kyndli, soleiðis at tey bæði liðini hava tvey stig fleiri enn VÍF í stríðnum um at sleppa undan niðurflyting.

Innan hýsis hava tey trý liðini fingið nett somu úrtøkuna, men fyrimunurin hjá StÍF og Kyndli er tann, at tey bæði hava vunnið hvør sín dyst móti liðum, sum stríðst um pláss í finaluni. StÍF vann tíðliga í kappingini á VB, meðan Kyndil fyri tveimum vikum síðani basti Neistanum. Og júst hesir báðir sigrarnir leggja nú eitt stórt trýst á VÍF. Eftir øllum at døma verður neyðugt hjá teimum úr Vestmanna at vinna í minsta lagi tríggjar av teimum fýra innanhýsis uppgerðunum, sum tær hava eftir móti StÍF og Kyndli, og tað kann vísa seg at gerast stórur biti hjá liðnum.

### FAKTA

**StÍF-Kyndil 23-18 (11-6)**
10 min: 2-2
20 min: 7-4
40 min: 15-8
50 min: 20-12
**Málskjúttar**
**StÍF:** Rebekka Justinussen 11(4), Fríðrunn Danielsen 3, Ninna K. Johansen 3, Signhild Petersen 2, Ata Gregersen 2, Bára B. Danielsen 1, Sólfríð Christiansen 1
**Kyndil:** Lina Andriulyte 7, Randi Wardum 4(3), Barbara Egilstrøð 2, Jacklin Durhuus 2, Tordis Tróndarson 2, Ronja Mikkelsen 1
**Brotskøst:** StÍF 4, Kyndil 3
**Útvísingar:** StÍF 2, Kyndil 4
**Dómarar:** Kristian Joensen & Kári Hansen